

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 01 - 2012

# Norska Odfjell risasáttmála við BP í Hetlandi

Stóru útbyggingarnar av oljukeldum skamt frá føroyska markinum vestan fyri Hetland hava stóran týdning fyri norskt vinnulív í hesum døgum. Odfjell Drilling hevur júst gjørt sáttmála við BP fyri sjey milliardir krónur um at lata ein boripall, sum skal brúkast vestan fyri Hetland. Felagið hevur seinastu 4-5 árini fingið sáttmálar um at byggja fimm flótandi boripallar og hevur í dag níggju av slagnum, sum arbeiða ymsa staðni á klótuni. Seinasta avtalan við BP er ein langtíðaravtala uppá fyribils sjey ár, nakað, sum er rættiliga óvanligt í oljuvinnuni. Pallurin skal bora brunnar á Schiehallion og Loyalkeldunum miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið. Keldurnar skulu útbyggjast fyri tíggjutals milliardir krónur fyri at økja um framleiðslu og fyri at nútímansgera hana. Nýggi boripallurin skal vera klárur seinast í 2014. Hann fer at verða serútgjørdur til at kunna arbeiða í ringum farvatni sum tað vestan fyri Hetland. Pallurin verður bygdur í Suðurkorea. Umframt BP eru eisini Shell, Hess, Statoil og Murphy við í hesi verkætlan. Arkivmynd - Boripallurin í hetlendskum farvatni